# Løgmálaráðið inn í gamla prestagarðin

**Gamli prestagarðurin úti á Reyni verður í hesum døgum endurnýggjaður og umvældur, og ætlanin er, at Løgmálaráðið skal nýta sethúsið sum arbeiðspláss, tá tað eftir ætlan verður liðugt í vár**

HØLISVIÐURSKIFTI
*Heini í Skorini*

Í hesum døgum verður dúgliga arbeitt við sethúsunum úti á Reyni, har prestarnir í sínari tíð húsaðust. Gamli prestagarðurin er eitt gamalt sethús, sum ikki hevur verið hildin við líka í longri tíð.

Men sambært Løgmansskrivstovuni er ætlanin nú at umvæla og endurnýggja gamla prestagarðin, so Løgmálaráðið kann nýta húsini at starvast í. Løgmálaráðið hevur í løtuni síni hølir í ovara partinum í Tinganesi, og hóast tað ikki er beinleiðis plásstrot niðri í Tinganesi, fær Løgmálaráðið væntandi brúk fyri fleiri hølum at starvast í komandi tíðina.



*Gamli prestagarðurin úti á Reyni verður í hesum døgum umvældur og endurnýggjaður, og Løgmálaráðið fer at starvast í hølunum, sum eftir ætlan verða tikin í nýtslu í vár*

*Mynd Finnur Justinussen*

## Liðug í vár

Sambært Løgmansskrivstovuni verða fleiri starvsfólk væntandi sett í starv í framtíðini, og tískil verður arbeitt uppá gamla prestagarðin, við tað at ov trongt verður í Tinganesi fyri Høgna Hoydal og hansara fólk.

Tó er tað ikki so, at sethúsini verða umvæld til beinleiðis skrivstovuhølir. Prestagarðurin verður endurnýggjaður og umvældur til eitt vanligt sethús, men í arbeiðinum verður tó støði tikið í, at fólk úr Løgmálaráðnum koma at starvast har.

Tað verður tó ikki í bræði, at húsini verða tikið í nýtslu, tí nógv arbeiði er eftir at gera. Innan er so at siga alt eftir at gera hjá timburmonnunum úti á Reyni. Sambært Løgmansskrivstovuni er ætlanin, at húsini skulu vera liðug móti vári, og tá verða húsini eftir øllum at døma tikið í nýtslu av Løgmálaráðnum. Við tað at húsini eru sera gomul, verða, umframt timburmenn og handverkarar, eisini fornfrøðingar inni í myndini í arbeiðinum.

## Lofti í Skansapakkhúsinum tøkt

Í niðasta húsinum í Tinganesi, Skansapakkhúsinum, eru eisini fleiri møguleikar hjá Løgmansskrivstovuni. Lofti í hesum húsi verður nevniliga ikki nýtt til nakað ávíst í løtuni, og eru tey hølini tøk at nýta.

Tankin hevur verið frammi at inrætta hølini til sjálvan løgmann burturav, men tó eru endaligar avgerðir ikki tiknar hesum viðvíkjandi. Grundlógarnevndin hevur hildið til í hesum hølum, men í løtuni hevur eingin fast hølir á loftinum í Skansapakkhúsinum, og tískil umhugsar Løgmansskrivstovan í løtuni, hvat skilabest er at nýta hesi hølir til í framtíðini.




Mikudagin 16. oktober 2002

TÝSKLAND - FØROYAR

Ferðing:
Farið verður úr Føroyum til Hannover tann 13. okt. og heimaftur til Føroya eftir dystin tann 16. okt.

Íroknað prísin er:
Flogferð Føroyar - Hannover - Føroyar, innivist í 3 nætur á hotel v/morgunmati, 2 útferðir, atgongumerki til dystin, bussflutningur í Hannover og ferðaavgjøld.

Grandhotel Mussmann***+
kr. 6.190
*Fyri hvønn í dupultkamari*
kr. 6.790
*Fyri hvønn í einakamari*

Hotel Kønighof am Funkturn***
kr. 5.770
*Fyri hvønn í dupultkamari*
kr. 6.545
*Fyri hvønn í einakamari*

Túrurin kann bíleggjast hjá Atlantic Airways á 34 10 40

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo



Fíggjarfólk

Søkt verður eftir fíggjarfólki til raksturin av innkrevjingarskipanini hjá Vágatunlinum og aðrar uppgávur í sambandi við virksemið hjá felagnum, herundir bókhald v.m.



Førleikakrøv
Tann rætti umsøkjarin
· hevur fíggjarliga útbúgving so sum HD, merkonom ella aðra hóskandi útbúgving
· hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
· hevur royndir frá arbeiðsmarknaðinum
· hevur kunnleika til føroyskt og enskt mál

Lønar og setanartreytir
Miðað verður ímóti at seta starvið 1. september 2002, ella eftir nærri avtalu. Løn og setanartreytir annars eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 350200 ella teldupost drh@tunnil.fo.

Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. august 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu sendast til:

Vágatunnilin p/f
Postboks 1010
110 Tórshavn

VÁGATUNNILIN
Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.tunnil.fo




Jóannes Eidesgaard, Javnaðarflokkurin:

# Bankin aftur til fólkið

**– Hetta er ein roynd at formalisera ognarviðurskiftini í Føroya Banka, áðrenn bankin verður privatiseraður. Fólkið bjargaði bankanum við 2,7 milliardum krónum, sum landskassin rindaði. Við at geva hvørjum føroyingi 5.000 kr í partapeningi sum endurgjald, kunnu vit samstundis fremja eitt sosialpolitiskt tiltak, sum fær allar skattalættar at blikna, heldur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins**



*Jóannes Eidesgaard og Javnaðarflokkurin vilja hava bankan aftur til fólkið. Flokkurin er vanliga afturhaldandi, tá talan er um at privatisera almannar ognir, men hann kann ganga við til at privatisera Føroya Banka, um fólkið fær sín part, sum sambært uppskoti floksins er 25% av partapeninginum, sum skal býtast javnt millum allar føroyingar*

*Mynd: Finnur Justinussen*

PRIVATISERING
*Eirikur Lindenskov*

– Javnaðarflokkurin hevur sum so ikki broytt støðu til privatiseringar, men vit kunnu bara staðfesta, at stórur meiriluti er á tingi fyri, at almennar ognir skulu privatiserast. Hetta er eisini staðfest í samgonguskjalinum. Vit kundu saktans livað við, at bæði Føroya Banki og Fiskavirking framvegis vóru almenn ogn.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, sum undir viðgerðini av løgmansrøðuni mánadagin vegna Javnaðarflokkin skjeyt upp at geva øllum føroyingum lut í privatiseringini av Føroya Banka.

– Vit kundu sjálvandi framhaldandi sitið og sagt nei og stríðst til síðsta mann ímóti privatiseringini. Men vit vilja heldur vera konstruktiv og gera okkara ávirkan galdandi.

## 5.000 krónur til hvønn føroying

Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum snýr seg um, at allir føroyingar skulu fáa hvør sítt partabræv upp á 1.000 krónur sum gávu um árið – fimm ferðir.

– Tað fall okkum fyri bróstið, at politikarar vildu selja bankan, sum landskassin – ella rættari sagt – sum fólkið bjargaði við 2,7 milliardum krónum. Vit halda so avgjørt, at fólkið eigur at fáa hetta endurgoldið á onkran hátt, og skjóta vit tí upp, at hetta verður gjørt við at lata hvørjum einasta føroyingi 5.000 krónur í partapeningi, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins vísir eisini á, at hetta í veruleikanum er at formalisera eigaraviðurskiftini hjá bankanum, áðrenn hann verður privatiseraður.

So er spurningurin, um allir føroyingar gera eitt kvetti við hesum partapeningi.

– Tað gera teir, um bankin framhaldandi verður eins væl rikin, sum higartil, og hava vit eina møguliga oljuvinnu í huga, so er tað nógv sum bendir á tað, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Skattalættin bliknar

Síðani tekur hann dømið um eina familju við trimum børnum. Tey fáa tilsamans 25.000 krónur í partapeningi. Verður kursurin 400, sum hann var fyri nøkrum árum síðani, so kunnu hesi partabrøv seljast fyri 100.000 krónur.

– Tað er í øllum førum eitt sosialpolitiskt tiltak, sum vil nakað – tá blikna allir skattalættar, sigur Jóannes Eidesgaard.

Spurdur, um hetta ikki kann føra til økta nýtslu, so sum Jørn Astrup Hansen, bankastjóri, og Sigurð Poulsen, landsbankastjóri, hava ført fram í útvarpinum fyrr í vikuni, sigur Jóannes Eidesgaard, at tað heldur hann ikki.

– Tú kanst ikki fara inn í ein radiohandil og keypa fyri eitt partabræv. Tað má fyrst umsetast til pengar. Eisini forðar skattalógin fyri hesum, tí sambært henni, so verður vinningur av partabrøvum, sum verða seld innan trý ár, skattaður, sigur hann.

Hann leggur eisini dent á, at tað ikki er so umráðandi fyri Javnaðarflokkin, at partapeningurin verður tillutaður eftir fimm árum. Skapar hetta ov stórar búskaparligar trupulleikar, so kann hetta gerast yvir eitt longri tíðarskeið – enn er hetta bara eitt uppskot, leggur Jóannes Eidesgaard dent á.

Javnaðarflokkurin hugsar sær, at 25% av partapeninginum í Føroya Banka verður latin føroyingum. Landskassin skal eiga 30%, og hini 45% kunnu so seljast á virðisbrævamarknaðinum.

– Á henda hátt forða vit fyri, at t. d. allur partapeningurin fer av landinum, tí tá verða bara 45% seld á marknaðinum í fyrsta umfari, sigur Jóannes Eidesgaard.

Javnaðarflokkurin skjýtur eisini upp, at eingin annar partaeigari, enn landið, kann eiga meira enn 5% av partapeninginum.

## Fólkslig bond

Jóannes Eidesgaard vísir á, at Jørn Astrup Hansen so ofta hevur víst á týdningin, tað hevur, at bankin hevur eitt tilknýti til fólkið – eina »fólksliga forankring«, sum hann plagar at siga. Hann heldur, at við hesum tilknýti kanst tú rættuliga gera Føroya Banka til fólksins banka.

– Men kann hetta ikki skaða virksemið hjá sparikassunum, at tit so leiðis skapa Føroya Banka eitt breiðari grundarlag við tað, at allir føroyingar skulu eiga bankan?

– Eg skilji væl, um onkur vil siga hatta. Men eg hugsi ikki, at kundarnir hjá Sparikassunum fara at rýma yvir til Føroya Banka, fyri tað, um teir fáa partabrøv í bankanum.

Spurdur um Javnaðarflokkurin eisini fer at skjóta upp, at allir føroyingar fáa partabrøv í eitt nú Fiskavirking, sigur Jóannes Eidesgaard, at tað als ikki er hugsandi:

– Fólkið hevur bjargað bankanum, og fólkið eigur endurgjald fyri tað. Hetta skal vera sum ein tøkk fyri bankabjargingina og alt tað svára stríðið, sum allir føroyingar máttu ígjøgnum í kreppuárunum, har nógv vóru rikin frá húsi og heimi, frá arbeiði, og har fleiri máttu rýma av landinum.

## Góða undirtøku á tingi

Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum fekk góða móttøku í løgtinginum undir viðgerðini av løgmansrøðuni. Hetta fegnast Jóannes Eidesgaard sum vera man um.

– Fólkaflokkurin var sera positivur. Teir eru óivað glaðir fyri, at Javnaðarflokkurin gloppar dyrnar fyri privatiseringum, tí eyðsæð er, at tað hevur týdning, at ein breiður politiskur meiriluti stendur aftan fyri ta avgerð, sum verður tikin um framtíðina hjá Føroya Banka, heldur Jóannes Eidesgaard.

Hann helt eisini móttøkuna frá Sambandsflokkinum bera tann positiva vegin.

– Men Sambandsflokkurin hevur eitt annað fyrivarni, tí flokkurin hevur fyrr havt uppskot frammi á tingi um, at fyrilit verður tikið fyri gomlu partaeigarunum, tá bankin verður privatiseraður, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men hann undraðist eitt sindur á tað, sum Tjóðveldisflokkurin førdi fram, at hetta var ein forering.

– Tað er tað ikki, hetta er sum sagt ein formalisering av eigaraviðurskiftunum, áðrenn bankin verður privatiseraður, sigur Jóannes Eidesgaard.

Kári á Rógvi, løgfrøðingur:

# Kann fáa stóra ávirkan á vinnulívið

**Uppskotið um at geva øllum føroyingum partapening í Føroya Banka kann føra til, at vinnulívið í framtíðini í størri mun verður eginpeningsfíggjað heldur enn lánifíggjað, heldur Kári á Rógvi, løgfrøðingur**



*– Tá allir føroyingar eru partaeigarar í Føroya Banka, so fáa allir føroyingar eitt forhold til tað at eiga eitt partabræv – sum kanska kastar nakað av sær eisini. Hetta kann elva til, at størri áhugi verður fyri at seta partapening í vinnulívið annars, heldur Kári á Rógvi, løgfrøðingur*

PRIVATISERING
*Eirikur Lindenskov*

– Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um at privatisera Føroya Banka við at geva øllum føroyingum 5.000 krónur í partapeningi ljóðar áhugavert.

Tað heldur Kári á Rógvi, løgfrøðingur. Hann heldur tað vera áhugavert, at Javnaðarflokkurin, sum hevur verið sera afturhaldandi viðvíkjandi privatiseringum, nú kemur við eini heilt aðrari dimensión í hesum máli. Hann vísir á, at hetta kann fáa rættuliga stóra ávirkan á vinnulívið í Føroyum.

– Tá allir føroyingar eru partaeigarar í Føroya Banka, so fáa allir føroyingar eitt forhold til tað at eiga eitt partabræv – sum kanska kastar nakað av sær eisini. Hetta kann elva til, at størri áhugi verður fyri at seta partapening í vinnulívið annars, sum aftur kann føra til, at vinnulívið í størri mun verður eginpeningsfíggjað heldur enn lánifíggjað, sigur Kári á Rógvi. Hann heldur, at hetta kann føra til, at vinnulívið fer at líkjast meira vinnulívinum í USA, sum í nógv størri mun er sett saman av smáum partaeigarum, meðan ognarviðurskiftini í vinnulívinum í Evropa í nógv størri mun eru konsentrerað á fáum hondum – færri, men størri partaeigarum, og í størri mun lánifíggjað.

– Hetta er so ein nýggjur formur fyri ognardemokratii, sum kann føra til, at bankin skal skipast øðrvísi, so vanligi partaeigarin hevur betri møguleika at koma til orðanna, eitt nú gjøgnum eitt umboðsráð.

Kári á Rógvi vísir á, at í 80'unum lænti fiskivinnan sera nógvar pengar. Hetta vóru pengar, sum fólk høvdu í bankunum. Fólkið misti ikki pengarnar, tá skrædlið kom, tí bankarnir vórðu bjargaðir. Fara fólk nú at seta pengar beinleiðis í vinnulívið, so eru tey sjálvandi meira útsett, men tey fáa tað eisini ávirkan á, hvussu vinnulívið verður rikið.